## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi, seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind. Yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar og hitin millum 16 og 19 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Fyrrapartin andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og ælingur, men seinnapartin minni vindur og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 15 og 18 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og eitt skifti regn, annars turt og sólglottar. Hitin millum 13 og 16 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Lot til andøvsgul av ymsum ættum og mánadagin ælingur, menn týsdagin yvirhøvur turt og sólglottar, tó mjørkaflókar. Hitin millum 12 og 16 stig.

## DAGSINS FØROYINGAR:

# »Vit kunnu avgera FM á stevnuni«

**Tvíburarnir, Maria og Kamma Wang, Sandavágur, eru 15 ára gamlar, fara í 10. flokk eftir summarfrítíðina og nú tær hava frí royna tær at tjena eitt sindur av pengum**




*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

**Hvat gera tit í dagligdegnum?**
- Vit hava summarfrí beint nú, og fara í 10. flokk, tá summarsteðgurin er av. Í løtuni arbeiða vit hjá kommununi sum ung í arbeiði, og tá vit hava frí róg-va vit við 5 mannafarinum Frúnni

**Hvussu gongur hjá tykkum umborð á Frúnni?**
- Tað gongur sera væl, og vit kunnu faktiskt avgera tað sjálvar á stevnuni, um vit vinna FM ella ikki. So vit venja dúgliga, og tað hava vit alla tíðina gjørt. Eini fýra-fimm ferðir um vikuna, so tað fer við nógvari tíð. Men tað er eisini øgiliga stuttligt og spennandi.

**Hvat arbeiða tit við beint nú?**
- Vit lúka ókrút, mála og tað vit annars gera hjá kommununi. Tað er finasta slag, men vit gera tað mest fyri at tjena pengar.

**Hvat finna tit so upp á seinni í summar?**
- Nú vita vit ikki heilt víst, hvussu longi vit arbeiða her, so tað er eitt sindur ringt at siga. Síðsti róðurin verður á Ólavsøku, so har fara vit sjálvandi. Eisini ætla vit okkum á Summarfestival, nú allir hinir festivalarnir hava ligið mitt meðan vit hava róð

**Fara tit á stevnu?**
- Ja, tað er planurin. Tá fara vit at rógva leygardagin, og so fara vit bara at ganga runt, práta og kanska ein túr í dans seinni.

**Hvørjum vilja tit heilsa?**
- Vit vilja gjarna heilsa vinfólkunum og familjuni, og serliga teimum umborð á Frúnni. Tær mugu dríva á leygardagin!


I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI


### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -- |
| Nuuk | 4 |
| Qaqortoq | 8 |
| Ammassalik | 4 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 9 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 13 |
| Lerwick | 14 |
| Aberdeen | 18 |
| London | 22 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 16 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 22 |
| Keypmannah. | 24 |
| Helsinki | 23 |
| Moskva | 29 |
| Berlin | 30 |
| Warzawa | 31 |
| Kiev | 26 |
| Bukarest | 27 |
| Paris | 26 |
| Madrid | 35 |
| Róm | 31 |
| Malorca | 29 |
| Athen | 29 |
| Malta | 29 |
| Tunis | 31 |
| Beijing | 30 |
| New Dehli | 26 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 22 |
| New York | 28 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 23 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | 32 |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 19 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 987 hPa. eystan fyri Ísland fer í landnyrðing. Eitt hátrýst, 1031 hPa. vestan fyri Írland fer eystureftir og mennist.




**Í dag:**
Lágtrýstið vestan fyri Ísland fer spakuliga í landnyrðing og kuldabrúgvin haðani verður væntandi yvir Føroyum leygardagin.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 11/7 kl. $06^{00}$– 12/7. $06^{00}$. Hitin í gjár: 11,9°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 2 mm – mált frá 11/7 kl. $06^{00}$– 12/7 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í juli: 25,6 mm


Sosialurin





## VESTFALLSKYRRINDI

13. juli — Mánin næstur jørðini — Kelda. Álmanakkin 2006

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 13. Juli | 09.18 | 21.42 | 08.18 | 20.42 | 08.33 | 20.57 | 11.18 | 23.42 | - | 12.18 | 07.33 | 19.57 | 06.33 | 18.57 | 09.33 | 21.57 | 10.33 | 22.57 | 09.03 | 21.27 | 10.18 | 22.42 |
| 14. Juli | 10.07 | 22.30 | 09.07 | 21.30 | 09.22 | 21.45 | - | 12.07 | 00.42 | 13.07 | 08.22 | 20.45 | 07.22 | 19.45 | 10.22 | 22.45 | 11.22 | 23.45 | 09.52 | 22.15 | 11.07 | 23.30 |
| 15. Juli | 10.54 | 23.16 | 09.54 | 22.16 | 10.09 | 22.31 | 00.30 | 12.54 | 01.30 | 13.54 | 09.09 | 21.31 | 08.09 | 20.31 | 11.09 | 23.31 | - | 12.09 | 10.39 | 23.01 | 11.54 | - |
| 16. Juli | 11.39 | - | 10.39 | 23.31 | 10.54 | 23.46 | 01.16 | 13.39 | 02.16 | 14.39 | 09.54 | 22.46 | 08.54 | 21.46 | 11.54 | - | 00.31 | 12.54 | 11.24 | - | 00.16 | 12.39 |
| 17. Juli | 00.31 | 12.52 | 11.52 | - | - | 12.07 | 02.31 | 14.52 | 03.31 | 15.52 | 11.07 | - | 10.07 | 23.01 | 00.46 | 13.07 | 01.46 | 14.07 | 00.16 | 12.37 | 01.31 | 13.52 |

5 707265 100050 >